miðvikan
Nr. 71 • 15. apríl 2009
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

### Nólsoy og Neptun:

# 75 ár síðan størstu vanlukku í nýggjari tíð

**Í Miðvikuna hevur eins og fyrr í FF-blaðnum verið roynt at festa lagnusøguna hjá føroyskum fiskimonnum á blað. Her er tíverri nógv at tríva í. Henda greinarøðin verður gjørd til minnis um teir 43 menninar, sum sjólótust í 1934 við Neptun og Nólsoy**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

**1. Partur**

Fyrr í vár høvdu vit fýra Miðvikur, sum umrøddu tær stóru sjóvanlukkurnar frá 1914 til 1924, og sum serliga raktu Suðuroynna.

Fyrstu árini í 1930-unum vóru Føroyar eisini hart raktar. Í 1930 hendi vanlukkan við Ernustinu, sum kostaði 9 mannalív, meðan 19 mans vórðu bjargaðir av einum ótrúligum avriki hjá einum av manningini, Ziska Jacobsen. Heystið 1931 fórst Vestmannasluppin Dora við 17 monnum. Laura og Immanuel úr Vági gingu burtur í 1932 við 38 monnum.

## 43 menn gingu burtur í senn

Árið 1934 var so aftur eitt rættuligt vanlukkuár hjá føroyskum fiskimonnum og Føroyum sum heild. Í mai mánaði hetta árið hvurvu tvær sluppir samstundis. Onnur var Nólsoy við 20 monnum, og hin var Neptun við 23 monnum. Við Neptun fóru ikki færri enn 9 mans úr Mykinesi. Sama tal fórst úr Vestmanna.

Tað fórust fórust átta hósvíkingar við Nólsoy.

Onnur skip, sum fóru hetta árið, men uttan tap av mannalívum, vóru Standard, William Stephenson, Sigrid og Tjaldrið.

Hetta er størsta vanlukka í Føroyum síðan vit fóru at reka skipsfiskiskap í 1872. Neptun er eisini størsta einstaka vanlukkan, sum er hend í Føroyum við sínum 23 monnum. Tann, sum kom henni næst, er vist Stella Argus í 1957 við 22 monnum.

Tað ber illa til at ímynda sær eina slíka vanlukku. Tá ið vit hugsa um fólkatalið í Føroyum fyri 75 árum síðani, so vildu 43 mans tá svara til einar 100 í dag.

Hevði fyrr í vár vitjan av einum enskum blaðmanni hjá Fishing News International, har vit tosaðu um hetta. Eftir fólkatalinum vildi hetta svara til, at 10.000 mans í besta aldri doyðu bert ein dag í Danmark. Í Bretlandi hevði tað svara til 100.000 mans og í USA 500.000. Hetta eru so ógvuslig tøl, at tað ber snøgt sagt ikki til at skilja tey.

Henda greinarøð er partvíst eitt savn av tí, sum er skrivað um hesar vanlukkur, fyrst og fremst í FF-blaðnum. Nógv av hesum hevur eisini veriåð í Føroya Siglingarsøgu hjá Páll Nolsøe. Men talan er eisini um nýtt tilfar, sum er grundað á samrøður við fólk, sum sótu eftir.

Endamálið er í samband við henda serliga minningardagin at savnað tað, sum kann sigast um Nólsoy og Neptun.

## Nólsoy hvørvur

Fyrst skal "Nólsoy" verða umrødd. Tað var Müller reiðaríið í Havn, sum átti skipið. Eiden Müller, sonur reiðaran Ebbu Müller, skrivar fylgjandi um hesa slupp, og tað sum hendi:

“Nólsoy var ein lítil slupp, TN 202, bygd í Elmshorn í Týsklandi í 1880. Til fiskiskap undir Íslandi hvarv hon í 1934 og hvørki skip ella manning spurdust aftur. Hetta var ein sonn sorgarhending. Skipari var Hans David Hansen úr Hósvík og flestu av manningini, vóru úr Hósvík og bygdunum har nærindis. Hjá mammu var tað ógvuliga sárt at boða familjunum frá. Tað vóru djarvir og raskir fiskimenn, sum vóru við Nólsoy, og sjálvsagt rakti sorgin djúpt í teimum mongu heimum sum varaðu av. Ongantíð gjørdist greitt, hvussu tilburðurin var farin fram, men um nakað um somu tíð fórst ein onnur føroysk slupp, Neptun, og har spurdist heldur eingin aftur, tíverri.”

Tann tíðin tá "Nólsoy" hvarv, apríl-mai, skuldi heldur ikki verið ringasta tíð av árinum. Men í bókini ”Tað hendi umborð” hjá Svenning av Lofti er ein frásøgn frá Christian Olsen, ættaður av Eiði, men sum var búsitandi í Klaksvík. Hann var undir Íslandi tá og minnist illveðri fyrst í mai í 1934 sum tað ringasta, hann hevði upplivað. So roknað varð við, at sovæl Nólsoy sum Neptun eru farin í hesum veðrinum.

Gitingar hava verið um, hvørt skipini kunnu hava rent saman. Hetta fara vit at koma aftur til.

## Andreas í Tarti: Seinastu sum sóu Nólsoynna

Í 2006 byrjaði í FF-blaðnum ein greinarøð við tí tá nærum 100 ára gamla Andeas í Tarti úr Oyndarfirði, har hann greiddi frá sínum langa lívi til sjós. Hann mintist so ótrúliga væl, og tað, hann segði um hesa vanlukku var fylgjandi:

“Vit vóru helst teir síðstu, sum sóu Nólsoynna. Ein stormur var á Suðurlandinum 27. apríl, hetta var ein rokstormur. So blíva nakrir dagar, har tað var gott veður, og nú fóru skipini vesturum. Vit sigldu í fínasta veðri vestureftir og brúktu bara motorin. Eg átti frívakt, tá vit komu um Reykjanes.

Tá vit eru komin nakað forbí, fortaldu teir fyri mær, at vit høvdu passerað sluppina Nólsoynna,



*Nólsoy, avmyndað í danska Blá Krossblaðnum*

og hon fór eysturyvir við størstu seglum við toppsegli, og eg hugsi, at hon hevði breiðfokkuna eisini.

Vit kláraðu tað ikki longur enn á Skagen, tá brendi hann á. At koma undir tað veðrið við størstu seglum hevur ikki verið lukkuligt. Hon eigur ikki at vera komin longur enn eystur um Grindavíkina. Eg kann ikki siga tað sikkurt, at eg sá hana, tá eg kom upp og fór á vakt, men hetta fortaldu teir so. Tað var so ringt veður, at vit lógu inn móti rivunum á Skagen og tordu ikki at venda. Men tíbetur, tað linkaði so mikið, og tá veðrið blíðkaði, tá slitnaði stagið hjá okkum.

Eg vil fortelja, hvat ein hósvíkingur fortaldi mær. Vit vóru saman við Nólsoyar Páll. Hann fortaldi fyri mær, at eitt konufólk hevði droymt skiparan á Nólsoynni tríggjar nætur uppí slag. Hann stóð so syrgin í kappanum og fortaldi fyri henni, hvar teir vóru.

Eg rokni við, at Nólsoyggin hevur verið flótandi tá, og skiparin segði bæði frá breidd og longd, hvar teir vóru staddir. Henda konan spurdi í dreyminum eftir Neptun, men hann svaraði ikki uppá tað. Eg trúgvi ikki, at skipini hava stoytt saman, sum summi hava hildið.

Eg havi eisini verið saman við manninum á Eyrabakka í Íslandi, sum fann líkið á kokkinum á Nólsoynni,” sum greitt verður frá seinni í greinini.

Tað eru fleiri slíkar frásagnir um Nólsoynna, og vit fara í komandi pørtum av hava fleiri. Millum aðrar eina hugtakandi frásøgn hjá Petreu Olsen, sum hevði fleiri avvarðandi við Nólsoynna.

## Ringurin, sum kom aftur

Tað einasta, sum frættist aftur frá Nólsoy, var, at 27. mai 1934 rak eitt lík av einum manni á land við Eyrabakka í Íslandi. Maðurin hevði ring á fingrinum og av honum kundi staðfestast, at hetta var 31 ára gamli Bernhard